Nr. 107/2019

Heðin Mortensen
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur viðvíkjandi innflutningi av hundum, kettum o.ø, settur landsstýrismanninum í umhvørvis- og vinnumálum, Helga Abrahamsen (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

1. Kann landsstýrismaðurin greiða frá, hvussu nógv djór ferðast árliga til og úr Føroyum?
2. Metir landsstýrismaðurin, at óttin fyri at fáa djórasjúku til Føroya er so stórur nú, at totalt forboð skal setast í verk fyri innflutningi av djórum?
3. Um so er, hvørjum ítøkiligum sjúkum er hesin óttin fyri?
4. Hvørt ár fara hundar til útlond til viðgerðar og kanningar, tí vit í Føroyum ikki hava neyðuga útgerð ella servitan til hetta. Hvat er ætlanin hjá landsstýrismanninum at gera við henda trupulleika?
5. Nógv djór ferðast uttanlands í sambandi við ymiskar kappingar. Hevur landsstýrismaðurin ætlan um at steðga hesum í framtíðini?

Viðmerkingar:
Ferðing og innflutningur av djórum hevur verið loyvt í mong ár, og higartil er mett, at fyribyrgjandi viðgerðir hava verið nøktandi. Gamla skipanin, har hundar skuldu í sóttarhald, varð broytt í 1996. Landsstýrið ætlar nú at rulla skipanina aftur og gera hana enn strangari. Broytingaruppskot til kunngerð um innflutning og ferðing við hundum v.m. er sent til hoyringar. Verður nýggja kunngerðin sett í verk, fer ikki longur at bera til hjá føroyskum hundaeigarum at fara uttanlands og hava hundin við.
Hvørt ár fara hundar til útlond til viðgerðar og kanningar. Hetta umfatar m.a. átrokandi viðgerðir og skurðviðgerðir fyri kroniskar sjúkur. Um broytingaruppskotið kemur í gildi, so verða kanska nógv djór, sum ikki fáa neyðuga viðgerð. Spyrjarin ivast í, um tað er nøktandi djóravælferð, at djór í Føroyum ikki fáa neyðugar viðgerðir og kanningar. Harafturat kann talan vera um eina skerjing í nútímans mátanum hjá fólki at halda djór. Hundar og kettur eru ikki longur djór, sum bara búgva í kjallaranum. Hjá fleiri eru tey nú partur av einum nútímans familjulívi, og fyri hesi er tað púra natúrligt at hava djórini við sær at ferðast.
Eisini ferðast nógv djór uttanlands í sambandi við kappingar. Kappingar hava stóran týdning fyri bæði fólk og djór. Tær kunnu roknast sum ítróttur og eru til frama fyri djóravælferð. Um ætlaða broytingaruppskotið kemur í gildi, kunnu vit vænta, at hundafeløg sum Seyðahundasamband Føroya og Hundaeigarafelag Føroya detta niður fyri, tí kappingar uttanlands eru orsøkin til, at feløgini eru til. Hetta vildi verið harmilgt, tí feløgini virka fyri djóravælferð heima í Føroyum við at veita kunning og venjing.

Á Løgtingi, 18. juni 2020

Heðin Mortensen